**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

# Eldraráðið 2021 – 2024

Fundur: Nr. 2

Tíð: 01-02-24 kl. 13.00 – 14.00

Stað: Tilhaldið í Tórsgøtu

**Møtt:** Robert Vilhelmsen, næstformaður, Julianna Klett, kassameistari og Marin Rasmussen, limur.

**Fundarskrá:**

1. Eldrabústaðir – Eldra Campus
2. Eldradagur 2024
3. Fund við Eldranevndina í TK
4. Innbjóðing frá Eldraráðnum í Klaksvík til tiltak 20.02 í Løkshøll, um Hospisætlan

AD 1 Eldrabústaðir – Eldra Campus

Orðaskifti var um eldrabústaðir og at fáa ítøkiligt samskifti við Býráðið um henda tørvin.
So at siga ongin loysn er á hesum tørvinum, sum skal gera tað møguligt at halda hús longst møguligt og soleiðis minka um trýstið á Ellis- og røktarheim.
Endamálið er at geva teim eldru møguleika at flyta úr verandi bústaði í eina íbúð, sum er hóskandi til tørvin í eldraárunum. Talan er um eitt bústaðarøki við 100-200 íbúðum við felags hentleikum og møguleika fyri røktarhjálp, í ávísan mun, eftir tørvi. Góðar royndir eru við slíkum verkætlanum, eitt nú í Danmark.
Endamálið er at geva teim eldru ein møguleika at flyta úr størri bústaði í eina minni og meira hóskandi íbúð við felags hentleikum, t.d. matarskipan, felagsrúm og lætta atgongd til møguligan røktartørv. Ein slík skipan vil samstundis stuðla undir útboðnum av bústaðum til barnafamiljur.

Tosað varð eisini um at hava ein almennan orðaskiftisfund um evni, soleiðis sum skotið varð upp á jólafundinum. Ein slíkur orðaskiftisfundur kann møguliga haldast í Tilhaldinum.

Evnið verður á fundarskrá við Eldranevndina í Býráðnum í næstum. Sí nærri niðanfyri.

AD 2 Eldradagur 2024

Eldradagurin skal verða í sept/okt., tvs. innan Eldraráðs- og býráðsvalið 2024. Høvuðsevnið á Eldradegnum verður viðgerð av bústaðartørvinum hjá teim eldru smb. omanfyri. Fyrireikingar til Eldradagin skulu ígongd skjótast gjørligt, og ætlan løgd innan summarfrítíðina. Møguligur íblástur skal eisini fáast við kunningarferð uttanlands í samstarvi við býráðið.

AD 3 Fund við Eldranevndina í TK

Ringt varð til Kristionnu Winther Poulsen, Heilsu- og Eldranevndin, um fund í næstum. Skotið varð upp hósdagin 29.2. ella 7.3. kl. 13. Vit frætta aftur frá Kristionnu.

AD 4 Innbjóðing frá Eldraráðnum í Klaksvík til tiltak 20.2. í Løkshøll, um Hospisætlan

Katrin hevur fingið fráboðan og innbjóðing frá Eldraráðnum í Klaksvík til eitt tiltak í Løkshøll 20. februar. Tey arbeiða við eini Hospis verkætlan, sum verður evni á fundinum. Vit frætta nærri um endaliga skrá og eru áhugað í at luttaka.

Næsti fundur verður hósdagin 7. mars 2024 klokkan 13 í Tilhaldinum.

Fundur lokin klokkan 14.00.

Tórshavn 01-02-2024

Robert Vilhelmsen,
skrivari